Fylgiskjal 13

LM-099/2020

Kommunufelagið

Fiskimálaráðið

Dagfesting
15. januar 2021

Okkara j.nr.
19/19

Málsviðgeri
Eyðun Christiansen

Tygara j.nr. 19/

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tilbúgving

Fiskimálaráðið hevur 7. des. 2020 sent Kommunufelagnum uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tilbúgving til hoyringar.

Endamálið við uppskotinum er

- At skipa kommunalu tilbúgvingarnar í 9 tilbúgvingareindir fyri at styrkja um leiðsluna og fakliga partin av tilbúgvingini.
- At seta á stovn ein felags kommunalan fráboðanarsentral, sum kommunurnar skulu bera kostnaðin av.
- At áleggja tilbúgvingunum, at hava ávísa samskiftisútgerð til tvørfakliga samskiftið.

Viðmerkingar

Kommunufelagið kann undir ongum umstøðum góðtaka, at eitt so grundleggjandi inntriv verður gjørt mótvegis kommununum og kommunalu skipanini, uttan at kommunurnar yvirhøvur hava verið við í fyrireikandi arbeiðinum, og enn minni eru kunnaðar um málið frammanundan. Tvungin samstørv millum kommunur eru á eldraøkinum og barnaverndarøkinum, men hesi eru hóast alt skipað í lóg eftir umfatandi og áralangt fyrireikingararbeiði millum land og kommunur.

Í uppskotinum til broytingar í lógini um tilbúgving verður m. a sagt, at tørvur er á at dagføra ásetingarnar um kreppustýring sum heild, millum annað orsakað av tveimum tilburðum: Annar tilburðurin var eldsbrunin á Varðanum Pelagic á Tvøroyri, og hin er koronufarsóttin. Eingin frágreiðing er tó um, hvussu fyriliggjandi uppskot hevði bøtt um støðuna í mun til nevndu tilburðir, ella um, í hvønn mun kommunalar tilbúgvingar hava havt, ella væntandi fara at hava týðandi leiklutir í stríðnum móti hendingum sum koronufarsóttini.

Í uppskotinum stendur, at landsstýrismaðurin undir einum aðalorðaskifti í 2018 skal hava róð framundir at leggja kommunalu tilbúgvingina saman í størri felagskommunal tilbúgvingarøki fyri at lyfta fakliga støðið. Kommunurnar hava ongantíð verið kunnaðar um hesa ætlan, og hava enn minni havt høvi til at viðgera hana saman við landinum.

Áhaldandi at leggja innihaldsliga og fíggjarliga tung málsøki í tvungin millumkommunal samstørv er ein óheppin tilgongd, sum elvir til minni gjøgnumskygni, ógreiðari ábyrgdarbýti og hóttir fólkaræðisliga grundarlagið undir kommununum, tí ein støðugt størri partur av innihaldinum í

Kommunufelagið

kommununum verður lagt uttanfyri fólkavaldu kommunustýrini at taka avgerð um. Og at gera hetta, uttan at kommunurnar eru tiknar við uppá ráð, er at gera seg inn á kommunala sjálvræðið á ein sjáldsama beinleiðis og grundleggjandi hátt.

Í sjálvum sær geva størri eindir ikki eina betri tilbúgving, betri skikkaða leiðslu ella hægri fakligt støði, hóast tað trúliga í fleiri førum hevði verið skilagott við tættari samstarvi millum kommunalar tilbúgvingar.

Í lógaruppskotinum er ásett, at landsstýrismaðurin kann áleggja kommununum at seta á stovn ein felags kommunalan fráboðanarsentral m.a. í teirri vón, at prehospitala tilbúgvingin eisini knýtir tey bæði sjúkrahúsini í Klaksvík og Suðuroy í teirra vaktsentral, so tað tilsamans verða tríggir døgnmannaðir sentralar í Føroyum, hvør við sínum fakligu førleikum. Kommunufelagið heldur hetta vera eitt lítið framsøkið átak, sum, fyri at brúka sama myndamál sum í uppskotinum, bert røkkur eitt petti á leiðini. Heldur enn at miðja ímóti at hava tríggjar fráboðanarsentralar, mælir Kommunufelagið til at kanna møguleikarnar fyri at stovna *ein* fráboðanarsentral fyri Føroyska samfelagið.

Kommunufelagið kann ikki góðtaka, at eitt lógaruppskot, sum hevur so týðandi skipanarligar, innihaldsligar og fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar, verður lagt fram, uttan at nakað samskifti hevur verið frammanundan.

Kommunufelagið mælir tí til, at uppskotið verður tikið aftur, og at fundur verður millum fiskimálaráðið og kommunufelagið, áðrenn farið verður víðari við málinum.

Vist verður eisini til viðmerkingarnar sum Felagið Sløkkiliðsleiðarar hevur gjørt til uppskotið.

Vegna
Kommunufelagið

Heðin Mortensen
Formaður

Eyðun Christiansen
Stjóri